UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 27. juni 2022
J.nr.: 22/11425-2
At tilskila í svari
Viðgjørt:
Tygara skriv:

**Viðvíkjandi byggisamtyktum: Krøv til tilfarið, sum skal sendast Umhvørvis- og vinnumálaráðnum saman við umsóknini um at góðkenna eina byggisamtykt**

**Heimild og mannagongd**

Broytingar í byggisamtyktum skulu fremjast sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir.

Kommunan eigur í viðgerðini av byggisamtyktarmálum at leggja dent á, at broytingin, eins og øll onnur planlegging, verður regulerað við atliti at hóskandi og haldgóðari heildarplanlegging.

Kommunan skal kunngera uppskot til ætlaða broyting á góðkendan hátt. Mælt verður eisini til at kunngera á heimasíðuni hjá kommununi og á portalum, ið verða brúktir í nærumhvørvinum.

Lýsingin skal við týðiligum myndatilfari vísa, hvat øki talan er um at broyta. Øll matr.nr., sum broytingin fevnir um, skulu verða nevnd í lýsingini, (sí viðheft dømi um lýsing).

Kommunan skal, alt tað er gjørligt, tryggja sær, at avvarðandi eigarar kenna ætlaðu broytingina.

**Skjalatilfar**

Tá ið byggisamtyktarmál verða send Umhvørvis- og vinnumálaráðnum til góðkenningar, skal greiðast frá:

1) endamálinum við byggisamtyktaruppskotinum,
2) politisku viðgerðini,
3) hoyringartilgongdini, og nær og hvar kunngerðin er lýst,
4) hvørji matr.nr. og øki eru fevnd av broytingini (korttilfar),
5) byggisamtyktarreglunum fyri og eftir broytingina,
6) avvarðandi eigarum og myndugleikum, sum eru hoyrdir, t.d. við at vísa til møguligar viðmerkingar frá eigarum, hagapørtum, Búnaðarstovuni ella Tjóðsavninum,
7) hvørjar avtalur, semjur og góðkenningar eru fingnar til vega frá øðrum myndugleikum, t.d. frá Landsverki ella friðingarmyndugleikunum, og
8) innkomnum viðmerkingum og mótmælum og viðgerðini av hesum.

Alt tilfarið skal sendast ráðnum talgilt í PDF-formati.

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN • TELEFON 30 66 00 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

**Krøv til korttilfar o.a.**

Korttilfar og annað tilfar, ið verður sent ráðnum talgilt, skal greitt og týðiliga vísa:

1) verandi byggisamtyktarviðurskifti (kort ella byggisamtykt),
2) byggisamtyktarviðurskiftini eftir ætlaðu broytingina og
3) yvirlitskort, sum týðiliga vísa staðsetingina av broytingini (sí viðheft dømi um viðheft kort).

**Mótmæli ímóti broytingini**

Kommunan skal viðgera innkomin mótmæli sambært fyrisitingarlógini.

Fyri at Býarskipanarnevndin skal kunna taka mótmæli við í málsviðgerðina, er neyðugt, at kommunan greitt og týðiliga vísir á, hvørji mótmæli eru innkomin, og sínar grundgevingar fyri, at mótmæli ikki eru gingin á møti.

**Býarskipanarnevndin**

Tá ið alt tilfarið er innkomið, verður umsóknin send Býarskipanarnevndini til ummælis.

Vegna Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri